*Niðanfyri er eitt uppskot til tekst, sum tit kunnu avrita og brúka at kunna heimini um, at flokkurin fer at arbeiða við Lær um sorg. Tit fáa bæði eini long boð, sum vit mæla til, at tit senda heimunum nakrar vikur áðrenn, tit fara undir gongdina og uppskot til tekstir at leggja á heimasetningin/í vikuætlanina.*

*Tit kunnu broyta tekstin, soleiðis sum hann hóskar til tykkara flokk og til samskiftisháttin, sum tit brúka til kunning til heimini.*

---

## UPPSKOT TIL VIKUBRÆV

Kæru avvarðandi

Næstu tíðina fara vit at arbeiða við einari undirvísingargongd, sum er á snar.fo. Endamálið er, at næmingarnir læra, hvussu teir kunnu skilja sorg, og hvussu teir kunnu vera góðir vinir hjá einum floksfelaga, sum syrgir.

Sigið okkum frá, um tykkara barn hevur verið í einari ella fleiri støðum við hóttandi sjúku ella deyða í familjuni. So kunnu vit hava tað í huga og fyrireika tykkara barn um gongdina og halda eyka eyga við barninum.

Vit hava valt at arbeiða við Lær um sorg í flokkinum, tí **[skrivið grundgevingina her]**

Kræftens Bekæmpelse, sum hevur gjørt tilfarið, arbeiðir fyri, at eingi børn skulu vera einsamøll við sorgini – sama hvør orsøkin er. Tey skriva:

**Hví læra um sorg?**
Nógv børn, sum syrgja, kenna seg einsamøll og uppliva, at javnaldrarnir hava trupult við at skilja tey. Men hvussu skulu tey skilja tað, sum tey ikki hava lært um?

Tí hava vit lær um sorg.

**Hvussu tosa tit við tykkara barn um undirvísingargongdina?**
Ávegis arbeiða børnini við einari faldibók, sum tey fáa við heim, tá ið gongdin er liðug. Tit eru vælkomin at hyggja í bókina saman við barninum at hoyra, hvat barnið hugsar um undirvísingargongdina, og hvat tað hevur lært.

---

## UPPSKOT TIL VIKUÆTLANIR

### 1.-2. tími
Vit arbeiða við einari gongd á snar.fo, har næmingarnir hitta Miu, sum hevur mist mammuna. Næmingarnir læra um, hvat sorg er og arbeiða við, at minni kunnu bæði fáa gleði og sorg fram í ljósið.

### 3.-4. tími
Vit halda fram at arbeiða við gongdini á snar.fo. Í dagsins tímum hitta næmingarnir vinirnar hjá Miu. Tey eru Nora og Adam, eisini hitta tey læraran, Hannu. Saman fara vit at kanna, hvussu sorg kemur til sjóndar á ymsan hátt.

**5.-6. tími**
Vit halda fram at arbeiða við gongdini á snar.fo. Í dagsins tímum fara vit at hjálpa Noru og Adami, hvussu tey kunnu vera góðir vinir hjá Miu. Næmingarnir fáa faldibókina heim við. Hyggið saman í hana og tosið um, hvat tey hava lært.

**EYKA VIRKNI**
Vit arbeiða við eykatilfarinum á snar.fo. Vit tekna okkara familjur/ Vit tekna og skriva eina heilsan til Miu / Vit fara í kirkjugarðin / Vit gera dukkusjónleik við skapunum á síðuni.